

Tónleikur

# Føroyskur tónleikur hot í Belgia

**Orca, Budam, Gestir og Boys in a Band framførdu um vikuskiftið á føroyska sýnisgluggatiltakinum Atlantic Soundscapes í Belgia, ið varð skipað av føroysku sendistovuni í Brussel, Norðurlandahúsinum og SamVit. Uml 100 umboð úr tónleikavinnuni og politikki úr nógvum ymsum londum vóru savnað saman at hoyra bólkarnar í væl umtókta spælistaðnum, Berschshouwburg í sentrum í Brussel. Men hvat søgdu hesi umboðini um tónleikin, og hvat er komið burturúr tiltakinum? Hesum spurningum svarar eygleiðarin hjá Sosialinum í dag**



*Boys in a Band vóru ekstremt væl upplagdir hetta kvøldið og fingu ordiliga alt at kóka*
*Mynd: Olivier Donnet*

Budam vóru fyrst á pallin. Síðani Orca. Eftir Orca komu Gestir. Og endað varð við Boys in a Band. Tað er lítil ivi í, at Orca og Boys in a Band áttu mest ógvusliga aftursvarið frá áhoyrarunum í salinum. Tey vórðu fullkomiliga blást um koll av hesum lívligu og spennandi framførslunum; kanska serliga Orca við oljutunnunum, fløskuorgulinum, pelabassinum og restini av teimum merkverdugu ljóðførunum, ið menninir spældu so meistaraliga á. Festivalfyriskiparar og fjepparar annars flokkaðust um Orca aftaná framførsluna, og teir hava longu nú fingið upp til fleiri avtalur í hús.

## Orca fer beint í hjartað

Jean-Louis Brossard, ið hevur verið tónleikastjóri fyri franska, alternativa tónleikafestivalin Trans Musicales í Fraklandi síðani 1979, var á staðnum. Hann var blivin somikið hugtikin av Orca, tá hann hoyrdi fløguna hjá teimum, at hann beinanvegin bookaði bólkin á næstu skránna hjá festivalinum, sum verður 4., 5. og 6. desember. Konsertin hetta kvøldið gjørdi hann bara enn meira sannførdan um sína skjótu avgerð.

- Eg fekk boð frá Christian Hald Buhl um, at eg mátti koma á Atlantic Soundscapes at hoyra føroyska tónleikin, ið skuldi framførast har. Christian veit um mín alsk fyri slíkum tónleiki, ið Orca spælir, so hann sendi mær eina fløgu av bólkinum og bað meg endiliga koma yvir at hoyra teir live. Eg fekk fløguna, eg lurtaði og hugdi at DVD fløguni, og eg varð seldur.

- Tað er ótrúligt so nógv teir hava gjørt fyri at skapa hetta konseptið, og so eru bæði tónleikur og show framúr væl úr hondum greitt. Eg gleði meg at fáa teir yvir til Trans Musicales at vísa fram. Og eg ætli mær eisini at gera nógv burturúr. Ætlanin er, at teir skulu koma yvir í eina viku ella tvær og hava eina ordiliga røð av konsertum á og rundanum festivalin. Tí hetta konseptið er ikki at forsmáa. Og tað hevur stóran týdning, at tað verður eksponerað ordiligt.

- Tað fer at krevja nógv bæði av mær og av teimum at fáa teir yvir, men Orca er tónleikur, ið fer beint í hjartað hjá mær. Tað er ein bólkur, ið eg trúgvi nógv uppá, og eg ætli avgjørt at gera mítt fyri at fáa skipað teimum ein so góðan tónleikatúr til Fraklands, sum yvirhøvur gjørligt, segði Jean-Louis Brossard.



*Sum skilst á lagnum, eru festivalar, ið høvdu umboð á Atlantic Soundscapes, farnir at ringja eftir Budam, men har er einki endaliga staðfest enn*
*Mynd: Olivier Donnet*

## Má sleppa til Føroyar

- Hinir tríggir bólkarnir, sum framførdu har, vóru ok, men tað var serliga Orca, ið eg var komin fyri at hoyra, so restin var ikki so áhugaverd fyri meg. Men teir skulu eiga eitt, og tað er, at eg keddi meg ongantíð! Og tú kanst ætla, at eg havi verið til nógv keðilig showcase tiltøk ígjøgnum árini! Og so var suppan, sum vit fingu (fiskasúpanin hjá Birgir Enni, blaðkv.) ræðuliga lekkur. Mær dámdi eisini væl grindina, og haldi yvirhøvur, at maturin var ógvuliga góður.

- Eg siti nú aftaná tiltakið eftir við einari øgiliga sterkari sannføring um, at eg skal til Føroyar. Eftir alt, sum eg havi upplivað til Atlantic Soundscapes. Eg skal til hetta landið hjá tykkum, kosta hvat tað kosta við. Og eg gleði meg ótrúliga nógv, sigur Jean-Louis stórsmílandi við meg, tá samrøðan er liðug, og hann reisist og fer avstað.

## Orca longu fleiri avtalur í hús

Afturat hesari avtaluni við Jean-Louis hava Orca fingið booking avtalu í lag við sama felagið, sum Jack Johnson og Coldplay hava í Hollandi, nevniliga The Alternative. Booking felagið NADA í Belgia hevur eisini fingið fatur á bólkinum, og so er góður møguleiki fyri, at teir skulu skriva undir sáttmála við eitt tað týdningarmesta distributiónsfelagið í Belgia, sum eitur Bang.

Fleiri onnur hollendsk